# Morten Olsen friðaður

Danska fótbóltssamabndið hevur gjørt øll púra greitt, at Morten Olsen skal verða venjari hjá Danmark í hesari HM-undankappingini – eisini um úrslitini ikki verða til vildar. - Morten Olsen er settur at taka sær av landsliðnum fram til 2010, og tað er einki á tí fótbóltsliga økinum, sum kann fáa okkum at skifta venjara. Í oktober 2009 fara vit at tosa við Morten Olsen um framtíðina, sigur Jim Stjerne Hansen, aðalskrivari hjá DBU.



# Pætur í landsliðshópin

Jógvan Martin Olsen hevur í dag kallað inn Pætur Dam Jacobsen úr Skála til landsliðshópin fyri leikbannaða Jónas Tór Nær. Pætur hevur ongan tíð áður verið í landsliðshópinum, og nú fleiri av hinum alternativunum eru í Grikkalandi við U21-liðnum kann hann fáa sín fyrsta landsdyst. – Eg vildi hava ein spælara, sum kann fara beint inn á bakkin, tí við avrikinum í Beograd í huga vildi eg sleppa at gera ov nógvar rokeringar, sigur Jógvan Martin Olsen.

# Andrias var skjótastur

**Andrias Hansen úr Havn hevur bert runnið í eitt ár, men tað eydnaðist honum at koma fyrstur á mál, tá Tórshavn Marathon varð runnið sunnudagin**

MARATHON

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við tíðini 2.49,54 eydnaðist Andrias at renna seg til gull á gott 42 kilometra drúgva teininum. Honum á baki komu Sam Vang og Johan Havn, sum leingi hildu stutt tjóður í Andriasi, men sum tó máttu geva skarvin yvir at enda. Hjá kvinnunum var Fríðunn Stenberg fyrst á mál.

Eisini varð kappast í hálvum marathon, og her varð Michael Feldballe úr Bragdinum fyrstur á málið hjá monnunum, meðan Katrin Rubek Nielsen var skjótasta kvinnan um málið.

Kappingin varð eisini býtt í aldursbólkar, soleiðis at heldur meira tilkomnu rennararnir kappaðust sínamillum. Aðrastaðni her á síðuni sæst, hvørjir fremstu rennararnir í hvørjum bólki vóru. Og her sást eisini, at aldurin ikki nýtist at vera nøkur forðing. Ann Thomsen, sum tók lut í bólkinum, 40+, rann nevnliga hálva marathon-teinin skjótari, enn skjótasta kvinnan í »vanliga« bólkinum.

Og tað sama varð galdandi á mannfólkasíðuni í hálvum marathon, har skjótastu menninir vóru skjótari enn yngru kappingarneytarnir.



*Andrias Hansen gjørdist greiður vinnari á marathonteininum sunnudagin*

*Mynd: Eirikur í Jákupsstovu*




*Í hálvum marathon var Michael Feldballe langt fremstur*

## FAKTA

**1/2 marathon, kvinnur 16-39**

| Nr | Rennari | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Katrin Rubek Nielsen, Tórshavn | 1.56,06 |
| 2 | Árna Helmsdal, Bragdið | 1.57.00 |
| 3 | Eyðna Kjartansdóttir, Tórshavn | 1.58,29 |

**1/2 marathon, kvinnur 40+**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ann Thomsen, Bragdið | 1.49,19 |
| 2 | Kristina Samuelsen, Bragdið | 1.53,21 |
| 3 | Frida Poulsen, Bragdið | 2.04,43 |

**1/2 marathon, menn 16-39**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Michael Feldballe, Bragdið | 1.30,05 |
| 2 | Anton Højgaard, Glyvrar | 1.33,53 |
| 3 | Rasmus Nielsen, Tórshavn | 1.37,05 |

**1/2 marathon, menn 40+**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Regin Zacahariasen, Bragdið | 1.22,49 |
| 2 | Absalon Hansen, Bragdið | 1.27,56 |
| 3 | Jonhard Larsen, Treysti | 1.28,37 |

**Marathon, kvinnur 18-29**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fríðunn Steinberg, Treysti | 4.03,26 |

**Marathon, kvinnur 40+**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ingrid Bærentsen Paturson, Bragdið | 4.09,29 |
| 2 | Lydia Gardar, Bragdið | 4.17,55 |
| 3 | Birita Lassen, Tórshavn | 4.22,46 |

**Marathon, menn 18-39**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Andrias Hansen, Bragdið | 2.49,54 |
| 2 | Sam Vang, Bragdið | 2.54,51 |
| 3 | Johan Havn, Treysti | 3.02,55 |

**Marathon, menn 40-49**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Cecil Weihe, Bragdið | 2.55,11 |
| 2 | Borgar Biskopstø, Treysti | 2.57,56 |
| 3 | Sigurð B. Justinussen, Bragdið | 3.01,38 |

**Marathon, menn 50+**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jósvein Herup Olsen, Bragdið | 3.20,16 |
| 2 | Tummas Joensen, Treysti | 3.37,07 |
| 3 | Óli Olsen, Bragdið | 3.49,49 |

# Umaftur!

**Tað eigur ikki at góðtakast, at landsliðsspælarar skulu ferðast í 16-17 tímar bert fýra dagar undan einum týdningarmiklum dysti**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Fótbóltssambandið fer at eftirmeta ferðina til Serbia, eigur eitt mál at standa ovast á dagsskránni. Ferðingin.

Bæði á veg til Serbia og ikki minst á veg heimaftur gjørdist talan um óvanliga drúgva ferð, har úti við tíggju tímar vórðu nýttir í bíðistøðu á flogvøllum í Frankfurt og Keypmannahavn. Og spurningurin er, um ferðin ikki eisini var óneyðuga drúgv.

Leygardagin høvdu spælararnir annars havt tað nóg strævið. Eftir eina serstakliga trupla uppgávu í nærum 30 hitastigum móti sterka serbiska landsliðnum, var klokkan farin um 23, tá spælararnir komu á hotelli, har matur sjálvandi var á skránni, áðrenn nakrar koyggjur vóru at síggja.

Longu klokkan 4 okkara tíð skuldi ferðalagið av aftur hotellinum, og her heima var hon farin um 21 á kvøldi, áðrenn spælararnir komu til hús. Og tað átti at verið óneyðugt. Í Frankfurt vístu talvurnar, at tvey onnur flogfør fóru til Keypmannahavnar, meðan bíðað varð á flogvøllinum, og varð farið í øðrum av hesum, hevði liðið verið somikið tíðliga í Kastrup, at onnur enn seinasta fráferðin til Føroya kundi verið nýtt. Og eisini var onkur ruta, sum hevði beinleiðis samband millum Beograd og Keypmannahavn.




*Tvey flogfør sóust fara til Keypmannahavnar, meðan føroysku spælararnir bíðaðu í Frankfurt*

Tað kann vera, at orsøkin til hetta var fíggjarlig, og sjálvandi eigur FSF at ansa eftir pengapunginum. Men tá talan er um spælarar, sum við eini knallharðari uppgávu í beinunum skulu løða upp til nýggja uppgávu bara fýra dagar seinni. Hvørki sálarliga ella kropsliga gjørdist talan um nakra størvegis uppløðing hjá føroysku spælarunum,og tað kann kosta mikudagin. Vónandi ger tað ikki tað, men undir øllum umstøðum eigur FSF at umhugsa, hvussu hesar ferðir verða lagdar til rættis í framtíðini.